Almanna- og bústaðamálaráðið

Fylgiskjal 2

Tórshavn 18-05-2026

Hoyringssvar frá Heilsuhjálparafelag Føroya viðvíkjandi uppskoti um broyting í løgtingslóg um at menna nýggja kt-skipan til barsilsskipanina.

Heilsuhjálparafelag Føroya tekur undir við endamálinum um at menna eina nútímans og brúkaravinarliga barsilsskipan. Felagið heldur tað vera jaligt, at arbeitt verður fyri einari skipan, ið skal lætta um umsitingina hjá borgarum, arbeiðsgevarum og hjá tí almenna.

Samstundis ynskir Heilsuhjálparafelag Føroya at leggja dent á, at talgilding ikki einans eigur at hava til endamáls at effektivisera umsitingina, men fyrst og fremst eisini skal merkjast sum ein betran fyri løntakaran.

Ein stórur partur av limunum hjá Heilsuhjálparafelag Føroya eru kvinnur, sum starvast innan umsorganarøkið. Barsilsskipanin hevur tí stóran praktiskan týdning fyri okkara limir. Tað er tí umráðandi, at nýggja skipanin tryggjar:

- greiða og skjóta kunning um rættindir o.a.
- eina einfalda umsóknartilgongd
- skjóta og trygga málsviðgerð
- møguleika hjá løntakaranum at fylgja við egnari umsókn

Heilsuhjálparafelag Føroya vil eisini leggja dent á, at “talgilt fyrst” ikki má gerast til “talgilt einans”. Hóast talgildar loysnir kunnu lætta um gerandisdagin hjá nógvum, eru borgarar ymiskir, og neyðugt er, at hjálp og vegleiðing framvegis eru tøk hjá teimum, sum hava tørv á hesum.
Felagið sær tað eisini sum jaligt, um nýggja skipanin gevur arbeiðsgevarum lættari mannagongdir. Tó eigur at tryggjast, at effektiviseringar ikki hava við sær, at størri umsitingarlig ábyrgd verður flutt yvir á løntakaran.

Heilsuhjálparafelag Føroya tekur samanumtikið undir við uppskotinum, men leggur dent á, at endaliga skipanin eigur at vera ein barsilsskipan, sum er løtt at brúka, trygg, gjøgnumskygd og tekur hædd fyri ymisku talgildu førleikunum hjá teimum borgarum, ið skulu brúka skipanina.

Heilsuhjálparafelag Føroya

Mary Antonsdóttir, forkvinna

Fr. Petersensgøta 7 · FO-100 Tórshavn
Telefon 317725 · Fax 319117 · email: hhff@hhff.fo · heimasíða.: www.hhff.fo